Grønlandstíðindi Kári við Stein

Grønlandstíðindi frá Kára:

# Góðir rækjuprísir

**Hetta eru seinastu tíðindini frá okkara manni í Grønlandi, Kára við Stein:**

**12. oktober**
Í dag eru – 3,4 stig og stilli. APPAK, fyrrverandi Eldfisk, nú heimahoyrandi í St. Johns New í New Foundlandi, er komin inn at landa svartkalva. Skipið var fult, um 270 tons. Polar Natarnaq kom inn at skifta fólk.

**15. oktober**
Í dag er stilli og -1,2 stig. Lómur landar í Pamiut í dag. Teir hava fiskað 96 tons í tvey samdøgur, tað er óført. Teir loystu aftur í kvøld nýggjan túr. Bæði Kappin og Polar Nagtoralik eru í Nuuk og landa í dag.

**17. oktober**
Í dag -1 stig og stilli. Akamalik kom inn at landa í morgun. Teir hava knappa fulla last. Teir hava verið norðuri´á umleið 72 stig og roynt. Har er so at siga allur flotin fyri tíðina. Steffan C landar í Manitsok í morgin. Har er vist alt fult, sum fyllast kann. Teir koma av somu leið sum Akamalik. Lómur er inni í Pamiut og landar. Teir hava gott 70 tons og hava roynt í tvey samdøgur út fyri Pamiut. Teir loystu aftur nýggjan túr í kvøld.

**18. oktober**
Í dag er lot av norði. Polar Nagtoralik var inni her í nátt eftir rækjupakningi. Akamalik loysti til nýggjan túr á døgurða.

**19. oktober**
Í dag er – 3 stig. Tað er væl av vindi av norði. Eitt sindur av kava kemur niður av og á. Polar Natarnaq kom inn at landa í morgun. Teir landa bert rækjur í sekkum, sum vera sendir herfrá niður til Nuuk á virkið, sum Polar Seafood eigur har. Ella suður til Alslusuba, sum liggur suðuri við Julianihåb, har teir eisini eiga eitt virki.

**20. oktober**
Í dag er blika logn og hvítt í bakka. Natarnaq kom inn í morgun at millumlanda. Teir skulla leggja um 140 tons av sekkjarækjum upp her. Teir skulla inn at landa og skifta fólk tann 25 okt í Nuuk. Tað er ein langur teinur hjá bátunum at sigla suður til Sisimiut, einir 30 tímar.

**23. oktober**
Í dag eru – 5 stig og stilli. Polar Amaroq kom inn at leggja gott 200 tons av eksportrækjum upp. Har var alt fult hjá teimun. Teir skulla landa í Nuuk 1. november. Teir loystu aftur í kvøld. Teir vóru ikki meira enn leysir, so kom Nanoq Trawl til kaj at landa. Teir hava gott 300 tons inni. Qaqqatsiaq var inni í Nuuk og landaði í gjár.

**24. oktober**
Í dag er stilli -6,5 stig. Natarnaq kemur til Nuuk í morgin at landa, og Regina C landar í Manitsoq í morgin. Nanoq Trawl loysti til nýggjan túr aftur í kvøld.

**25. oktober**
Í dag eru – 5,9 stig og stilli. Skeljabáturin Anna Kiil kom inn at landa í morgun. Teir hava um 20 tons eftir 35 døgum. Teir taka ikki rognini við nú, tí prísurin er knapt 20 kr minni fyri kilo sum nú er. Uttan rogn fáa teir gott 70 krónur fyri kilo. Acadienne Gale II, fyrverandi Tasiilaq, kom inn at bunkra. Teir mangla nakað í fulla last. Teir hava um 500 tons av svartkalva, og so taka teir eisini høvdini. Fyri tey er prísurin næstan líka so góður sum fyri sjálvan svartkalvan. Tá ið teir hava fingið uppí, skulla teir suður til Halifax at landa, so tað er ein langur teinur at sigla hjá teimun. Tá ið teir vóru lidnir, kom fyrrverandi Hvítanes, nú Inusknuk, inn at landa. Teir hava knapt 400 tons inni av svartkalva og svartkalvahøvdum.

**26. oktober**
Í dag er stilli og nógvur kavi kom niður í nátt. Inusknuk var liðugur at landa seinnapartin. Teir sleppa ikki avstað fyrrenn í morgin leygardagin. Tá kemur ein leigaður flúgvari við fólki.

Teir trolarar, sum kóka rækjur av feltinum uppi við 72 stig hava fingið ein óføran prís fyri lastina. Teir hava havt nógv av støddini 70/90, hetta er sum í gomlum døgum. Søgur siga, at teir hava ligið frá 8 til 13,2 millónir fyri lastina. Hetta er eisini sum í gomlum døgum. Lagið er gott á monnum

**29. oktober**
Manu, sum veiðir svatkalva, landar í dag 204 tons í Manitsoq.

Teir hava fiskað í 19 dagar. Veðrið hevur verið hampuligt hendan túrin.

Teir hava fiskað norðanvestan fyri, og teir fara norður eftir aftur næsta túr.


